## SAVNSHJÁLPARI til Føroya Náttúrugripasavn

Eitt hálvtíðarstarv sum savnshjálpari á Føroya Náttúrugripasavni er leyst at seta 15. august.

Uppgávurnar hjá savnshjálparanum verða serliga:

- at taka sær av skúlaflokkum og øðrum bólkum, sum vitja framsýningarnar við at vísa runt og greiða frá framsýningunum.
- at gera ymiskt upplýsandi tilfar í sambandi við framsýningarnar, fyrst og fremst tilfar til skúlaflokkar
- at taka lut í gerð av framsýningunum.
- at hava ábyrgd av lutunum í savnskioskini.
- taka sær av skráseting og røkt av arkivunum á plantudeildini.
- annars taka lut í øllum fyrifallandi arbeiði á stovninum.

Fyrimunir kunnu vera, at umsøkjarar hava læraraútbúgving við sergrein í náttúrufrøði, ella á annan hátt hava fakligan kunnleika til náttúruviðurskifti og frálæru. Aðrir fyrimunir eru arbeiðsroyndir innan teldunýtslu, serliga tekst- og databasuviðerð. Umsøkjarin eigur at hava vanligt koyrikort.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast um starvið við at ringja til Annu Mariu Fosaa, Føroya Náttúrugripasavn.

Umsóknir, saman við frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m. skulu vera **Náttúrugripasavninum, V. U. Hammershaimbsgøta 13, Postsmoga 1295, FR-110 Tórshavn, tlf. 12306** í hendi í seinasta lagi 15. juli.



## KUNNGERÐ frá Telefonverkinum

Av tí at telefonrokningin fyri juli ársfjórðingin var ov seint send út, verður gjaldfreistin fyri telefonrokningarnar fyri juli mánaða útsett frá 10. til 17. juli 1997.

**Telefonverk Føroya Løgtings**


*Texaco, Conoco og Murphy Oil vitjaðu løgmann:*

# Í lagi við almennum føroyskum oljufelag

*-Gera føroyingar av at stovna eitt alment oljufelag, sum skal vera við saman við útlendsku feløgunum, tá olja verður funnin, so kunnu vit væl liva við tí sigur kanningarstórin hjá Texaco, Charles Abernethy. Hann heldur føroyingar eru í eini serstøðu í so máta, tí møguleikarnir her eitt nú at útvega kapital eru avmarkaðir.*



*Edmund Joensen, løgmaður, Arni Olafsson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini og Martin Heinsen, leiðari á Oljufyristigingini her saman við umboð fyri oljufeløg, Charles Abernethy, Texaco, Martin Wh iteley, Murphy, Philip Close, Conoco, Sam Dalziel, Conoco og Dave Peace, Texaco.*

Í farnu viku vitjaðu ikki færri enn 12 umboð fyri trý útlendsk oljufeløg í Føroyum. Feløgini eru øll amerikonsk, Texaco, Conoco og Murphy. Hetta er so fyrstu ferð, at umboð fyri Murphey Oil eru í Føroyar. Tað var herfyri, at felagið gjørdist partur av Texaco/Conoco samtakinum - bólkinum.

Umboðini kunnaðu Oljufyrisitingina og løgmann um seinastu úrslitini av sínum kanningum, og tey hava eisini havt fund við Føroya Oljuídnað, har tosað hevur verið um møguleikarnar at brúka føroyska arbeiðsmegi og læra upp føroyingar til eina komandi oljuvinnu.

Millum luttakararnar í ferðalagnum var eisini stjórin fyri øllum kanningunum hjá Texaco á øllum Atlantsmótinum, Charles A. Abernethy.

Hann sigur við Sosialin, at teir hava greitt myndugleikum og løgmanni frá seinastu kanningarúrslitunum frá føroysku undirgrundini. Hesi síggja rættiliga lovandi út leggur hann aftrat.

Tað snýr seg serstakliga um seismisku kanningarúrslitini men eisini um geokemiskar analysur, sum eru gjørdar av gróti og øðrum tilfari, ið varð savnað í oyggjunum í fjør.

### Løgmaður gav sær góðar stundir at lurta

Sosialurin skilur, at oljufeløgini vóru rættiliga leingi inni á skrivstovuni hjá løgmanni, har tey greiddu honum frá áhugaverdu úrslitunum.

*-Men hvat søgdu tit løgmanni?*

-Vit søgdu honum, at tað vit síggja í undirgrundini er sær sera lovandi út, og at vit síggja fram til, at 1. útbjóðingarrunda verður lýst og sjálvandi eisini, at lóggávan verður samtykt í løgtinginum

Umboðini fyri tey trý oljufeløgini høvdu eisini við sær eitt spildurnýtt kort yvir føroyska landgrunnin, sum vísir tey mest áhugaverdu økini.

Charles Abernethy greiddi løgmanni frá, at tað finnast nógv áhugaverd øki kring Føroyar, har møguleikar eru at finna olju og gass.

Her er talan um føroyskt øki og ikki um umstríddu økini.

- Tað er ov tíðliga enn at siga, um tað fer at eydnast okkum at finna olju og gass í føroyskum øki, men øll tekin, sum vit hava fingið frá okkara seismisku kanningum, geokemisku kanningum og jarðfrøðiligu viðgerðini benda tann rætta vegin. Vit halda tí, at tað er góður møguleiki fyri, at vit í framtíðini fara at síggja spennandi úrslit á føroyskum øki.

Charles Abernethy dylur tó ikki fyri, at teir undirmeta ikki basaltið, sum fer at verða ein rættiliga stór forðan bæði hvat viðvíkur at fáa seismiskar upplýsingar og at bora.

Fyri at fáa enn betri upplýsingar fara tey trý feløgini at gera kanningar við kaðali á havbotninum við Føroyar. Tað verður í september, og tað er seismikkfelagið PGS, sum stendur fyri hesum arbeiðinum. Endamálið við hesum kanningum er at finna ein teknikk, sum ger teir betri førar fyri at síggja niður gjøgnum basaltið.

Hóast trupulleikar at síggja niður gjøgnum basaltið, so hava feløgini gjørt sínar útrokningar og metingar. Hesar eru sum áður víst á rættiliga lovandi. Tær vísa, at tað finst tað teir kalla „sourcerock", sum er ein avgerandi fyritreyt fyri at kunna finna olju yvirhøvur.

Hetta liggur so mikið djúpt, at tað skal hava borið til at generera olju og gass. Teir halda seg eisini síggja stór reservoir, og aðrar fyritreytir tykjast eisini vera tilsteðar, sum eru avgerandi fyri at kunna finna olju og gass. Øll hesi tekini íbirta vónir, men tað verða so eisini tekniskir trupulleikar, sum skulu loysast.

### Hetlandsøkið gott at byggja á

Vit spurdu Charles Abernethy, hvussu hann metir útlitini at finna olju við Føroyar, um vit samanbera við ta leiting og tey fund, sum eru gjørd vestan fyri Hetland.

Hann vísir á, at tað er lættari at leita vestan fyri Hetland, tí her er einki basalt men viðgongur, at tað eru borað meira enn 120 hol har og at tað bert eru gjørd fá fund.

Øll trý feløgini í bólkinum hava útvegað sær

